



# Harley við Clinton-signaturi

týsdagur 2. oktober 2007

Ludvík Petersen segði meira at kalla í skemti við Ova Ritter frá HD.FO, at hann skuldi keypa hesa motorsúkkluna, um Ove fekk Bill Clinton at signera hana. So tað gjørdi Ove bara. Her er signatururin og Ludvík hevur keypt súkkluna. Talan er um eina FLHTCUSE2 Electra Glide Ultra Classic, Screaming Eagle. Tú tekur eitt toppmodel av Ultra classic og gevur henni alla hugsandi eykaútgerð - tað finnast bara nakrar heilt fáar, hendan er Nr. 193 og hevur smáting sum cruise control, navigasjón, hita í handtøkunum, CB, CD og ræddarstýrt intercom.